Skúlin á Argjahamri

á Argjahamri, tann 12. mars 2020

Til næmingar og foreldur í hádeild!

Frá mánadegi 16. mars, og fyribils í 2 vikur, er vanliga skúlagongdin niðurløgd.

Í hesum sambandi fer skúlin at royna at skipa seg so, at undirvísingin kann halda fram, so væl sum gjørligt, hóast næmingarnir eru heima.

Tað er av týding at hádeildin kemur í skúla í morgin og fær kunnin um komandi dagar og at fáa tilfar heim við, so sum teldur o.a.

Kl, 10.00 verður kunning til 9. fl um tøkini í samband við verkætlanina.

Lærarar í hádeildini fara at dagføra vikuætlanina, so at allir næmingar kunna gera sítt heimaarbeiði.

Næmingar kunnu seta seg í samband við læraararnar á teldupostadressuni (sí heimasíðuna).

Eru serligir spurningar frá foreldrum, ber til at seta seg í samband við flokslæraran.

Vinaliga

Skúlin á Argjahamri

Marjun Holm, skúlastjóri